## Stórar ætlanir

Bygdaráðið í Hvannasunds kommunu hevur stórar ætlanir, og tað sæst eisini á fíggjarætlanini fyri 2007, tí íløgurnar eru lutfalsliga stórar samanborið við støddina á kommununi. Bygdaráðið hevur játtað tríggjar mió. krónur til skúlaútbygging, tvær mió. krónur skulu brúkast til útstykking og at keypa lendi fyri, og ein mió. krónur fara til vatnreinsiverk. Skattaprosentið í kommununi er 20,1, og tað er tað sama sum í ár.

## Kveikingardagur

Týskvøldið í næstu viku skipar Agenda 21 Stovan fyri kveikingardegi um burðardygga menning á Hotel Hafnia í Havn. Tiltakið er serliga ætlað kommunupolitikarum, kommunalum starvsfólki og øðrum, sum hava áhuga fyri at skapa sjálvberandi og varandi menning í kommununum. Greitt verður frá føroyskum og íslendskum verkætlanum, og høvi verður at kunna seg um møguleikar fyri orkusparing á kommunalum stovnum.

# Manningarnar við Skálabergi og Sundabergi burtur á jólum

**Stívliga 60 mans, sum eru við langfaraskipunum Skálabergi og Sundabergi fara at halda jól í russiskum sjógvi í Barentshavinum í ár**




*Sundaberg í Ánunum herfyri – júst afturkomin úr Grønlandi, har teir hava fiskað svartkalva. Síðan bar leiðin upp í Barentshavið, har bæði Sundaberg og Skálaberg verða um jólini*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Ert tú fiskimaður, liggur tað ikki í tínum hondum at avgera, nær tú ert heima, og nær tú ert burtur. Tú kanst í ein ávísan mun leggja til rættis tíðina umborð, men tað vil altíð vera soleiðis, at tú onkuntíð kundi hugsað tær at verið heima, tá ið tú noyðist at vera burtur.

### Burtur á jólum

Allir fiskimenn kundu eins og flestu onnur hugsað sær at verið heima á jólum, men soleiðis fellir tað ikki altíð hjá sjófólki, minni enn so.

Báðir langfaratrolararnir hjá JFK-Troli í Klaksvík verða burtur á jólum. Um ársskiftið, tá ið fólk hugna sær heima við hús saman við sínum kæru, verða stívliga 60 mans, sum sigla við hesum báðum skipum, í russiskum sjógvi í Barentshavinum.

Hanus Hansen, stjóri í JFK-Troli, sigur, at Skálaberg hevur roynt har uppi í eini 25 samdøgur, og Sundaberg er nýliga farin og nærkast nú fiskileiðunum har eysturi.

– Fiskiskapurin í russiskum sjógvi hevur verið brúkiligur, síðan Skálaberg byrjaði nýggjan túr. Gongst, sum ætlað, koma bæði skipini heimaftur einaferð í januar mánaða.

Hann sigur, at útlitini í Barentshavinum eru, at kvoturnar fara at minka, men prísirnir hava verið góðir.

– Árið í ár hevur roynst rímiliga væl hjá báðum skipunum, og vit vóna, at komandi ár eisini verður á eini leið, sigur Hanus Hansen.

### Svartkalvi

Sundaberg var á Klaksvík herfyri, har okkurt var gjørt við spølini.

Skipið hevur roynt eftir svartkalva í Grønlandi, og reiðarin sigur, at veiðan á túrinum var eini 300 tons.

Nú skipið var heima á veg upp í Barentshavið, løgdu teir ikki veiðina upp.

– Svartkalvin er umborð enn, og tá ið skipið kemur heim aftur úr Barentshavinum í januar, verður øll veiðan løgd upp, sigur reiðarin, Hanus Hansen.

SEV um oljulekar:

# Eru líka so ovfarin sum Brunaumsjón Landsins

**Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at elfelagið er líka so ovfarið um oljulekarnar á tanganum á Vágsverkinum sum Brunaumsjón Landsins, og tí verður helst ein óheft kanning sett í verk**

OLJULEKI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Jú, vit standa eisini spyrjandi, hvussu hetta kundi henda. Vit hava syrgt fyri



*– Enn er eingin endalig avgerð tikin, men ein møguleiki, sum vit umhugsa, er, at kappa tangan av og síðan byggja ein nýggjan botn undir hann, sigur stjórin í SEV, Klæmint Weihe*

tí reguliga eftirliti, sum skal gerast – og so kortini hendi hetta, sum ikki eigur at henda.

Klæmint Weihe, stjóri í SEV, sigur, at elfelagið í løtuni umhugsar, hvat gerast skal til tess at fyribyrgja, at slíkt ikki hendir aftur.

– Vit umhugsa ymiskar møguleikar, og ein er at seta í verk eina óhefta kanning sum kanska kann siga okkum, hvørji ráð eru til at taka.

### Nýggjur botnur

Klæmint Weihe sigur, at nú oljan er fingin úr tanganum, umhugsar SEV eisini, hvat skal gerast við stóra tangan á Vágsverkinum, sum lak í tveimum støðum.

– Enn er eingin endalig avgerð tikin, men ein møguleiki, sum vit umhugsa, er, at kappa tangan av og síðan byggja ein nýggjan botn undir hann.

Stjórin vísir á, at SEV hevur fylt 1.500 tons av oljuni, sum var í tanganum á Oyrunum, í tangar, sum felagið hevur á Sundi, og síðan er restin fylt í tann minna tangan, ið stendur við síðuna av tí, sum fór at leka.

Hann sigur, at oljan, sum er á Sundi, er av júst sama slagi, sum oljan, ið nú er komin av Vágsverkinum.

– Slamsúgvarar hjá IRF hava tikið nøkur tons av olju, sum eru farin til oljureinsivirkið á Kambsdali, og síðan er nakað farið út í tangagarðin, sum í samráð við myndugleikarnar á økinum verður reinsaður.

### Virksemið tryggjað

Klæmint Weihe sigur, at sjálvt oljutapið er ikki stórt, men tað virksemið, sum var í Oyrunum í sambandi við hendingina, sjálvandi kostar nakað av peningi.

–Okkara virksemi er tryggjað, og sum tíðin líður, fæst greiði á, hvat oljulekarnir og tað virksemi, sum gjørdist neyðugt í hesum sambandi, fer at kosta felagnum, sigur stjóri í SEV.